# Noreg fingið nýggja stjórn

**Kjell Magne Bondevik skal enn eina ferð royna seg sum stjórnarleiðari**

Nýggja samgongustjórnin hjá Høgra, Kristiliga Fólkaflokkinum og Vinstra tók við í gjár.

Stjórnin hevur ikki meiriluta í Stórtinginum, men Framburðsflokkurin hevur givið lyfti um at styðja stjórnina, sum sostatt hevur meirilutan aftan fyri seg. Eygleiðarar í Oslo hava tó ávarað um, at Framburðsflokkurin kann gerast svikaligur sum stuðul hjá stjórnini, og at flokkurin uttan iva sum frálíður fekk at seta stjórnini krøv um ávirkan á politikkin.

Tíggju av teimum 19 ráðharrunum í stjórnini eru úr Høgra, sum eisini er størsti flokkur í stjórnarsamgonguni. Politiskir eygleiðarar í Noregi halda tað vera ein stóran sigur hjá Høgra, at flokkurin hevur meirilutan av stjórnarlimunum. Eisini verður víst á, at fleiri av teimum fremtu Høgra-politikarunum eru komnir í stjórnina, og at hetta uttan iva fer at bera í sær, at Noreg fer at snara til høgru.

Teir 19 ráðharrarnir í stjórnini hjá Kjell Magne Bondevik eru:

Forsætisráðharri: Kjell Magne Bondevik (KrF)
Uttanríkisráðharri: Jan Petersen (H)
Fíggjarmálaráðharri: (Per-Kristian Foss (H)
Almannaráðharri: Ingjerd Schou (H)
Kenslumálaráðharri: Kristin Clemet (H)
Fiskimálaráðharri: Svein Ludvigsen (H)
Landbúnaðarráðharri: Lars Sponheim (V)
Verjumálaráðharri: Kristin Krohn Devold (H)
Mentamálaráðharri: Valgerd Svarstad Haugland (KrF)
Løgmálaráðharri: Odd Einar Dørum (V)
Samferðslumálaráðharri: Torild Skogsholm (V)
Vinnumálaráðharri: Ansgar Gabrielsen (H)
Kommunumálaráðharri: Erna Solberg (H)
Oljumálaráðharri: Einar Steensnæs (KrF)
Familjumálaráðharri: Laila Dåvøy (KrF)
Heilsumálaráðharri: Dagfinn Høybråten (KrF)
Arbeiðsmálaráðharri: Viktor D. Norman (H)
Umhvørvismálaráðharri: Børge Brende (H)
Menningarmálaráðharri: Hilde Frafjord Johnson (KrF)








# Ferðast bíliga eftir jólagávunum

**Atlantsflog bjóðar bíligar ferðir til Danmarkar fram móti jólum. Esiini onnur góð tilbóð eru í vón**

FLOGFERÐSLA

Atlantsflog boðar í tíðindaskrivi frá, at felagið fer at bjóða viðskiftafólki sínum bíligar feðrir til Danmarkar til fram móti jólum.

Frá 28. oktober til hálvan december fer tað bert at kosta 1.600,- krónur at flúgva millum londini.

Treytir liggja tó við, sigur Atlantsflog. Tær eru, at í minsta lagi tvey fólk ferðast saman fyri hendan prísin, eins og tey skulu vera burtur um vikuskiftið. Eisini skulu ferðaseðlarnir vera keyptir í seinasta lagi eina viku, áðrenn farið verður avstað.

Tað er avmarkað pláss við flogfarinum, so tað ræður um at vera fyrstur á kvørnini fyri at sleppa at mala. Ferðaseðlarnir verða seldir teimum, sum fyrst bíleggja, sigur Atlantsflog í tíðindaskrivinum.

Eisini verður boðað frá, at tað fara at koma onnur tilboð í næstum. Talan er um tilboð til onnur ferðamál hjá Atlantsflog so sum Reykjavík, Aberdeen og London.

**ej**

# Ein strika í rokningini

**Tann Sosialurin, sum lesarin nú hevur í hondini er fyrsta føroyska blaðið, sum er prísmerkt við strikukotum**

STRIKUR
*Jákup Mørk*

Blaðið, sum lesararnir sita við í dag, er á sín hátt ein nýskapan í føroyska blaðheiminum.

Í horninum á baksíðuni sæst nevnliga eitt strikukotumerki, og er hetta fyrsta ferðin, at slíkt verður nýtt í føroyska blaðheiminum.

## Lættir um

Fyri einstaka lesaran hava hesar svørtu rípurnar neyvan hin stóra týdningin, og er tað sum heldur ikki til sjálvan lesaran, at hesar eru ætlaðar.

Hinvegin er hetta stig tikið, tí strikukotur eru vorðnar ein alt meira vanligur partur av handilslívinum, har telduskrásetingarnar hjá handlum og sølubúðum gerast alsamt neyvari.

Hjá teimum sølustøðum, sum nýta strikukotulesara, verður tí nógv lættari at fylgja við, hvussu blaðsølan er, og ikki minst man tað eisini lætta um, at ymsu bløðini verða merkt við hvør sínari kotu, soleiðis at teldan sær mun á, um tað nú er týsdags- ella mikudagsblaðið, sum verður selt.

Strikuotur eru annars ein europeiskur standardur, og merkir hetta, at ymsar vørur frá ymsum framleiðarum ongan tíð kunnu hava sama frámerki. Tað er nevnliga soleiðis, at talan er um eitt trettan-siffrað tal, sum vørurnar verða eyðmerktar við, og tí er møguleiki at hava 10.000.000.000.000 ymsar vørur í skipanini. Av hesum hevur Sosialurin fingið tillutað fimm siffur, so hóast vit gera nýtslu av fimm møguleikum, er møguleiki at eyðmerkja ikki færri enn 10.000 bløð á ymsan hátt.



Lívfrøðiligt kríggj:

# Serstakt dunnuslag etur dreparasnigil

**Alt bendir á, at ein háttur at koma dreparasniglunum til lívs, er at fáa sær sonevndu Moskus-dunnurnar**

DJÓRALÍV
*Dagfinn Olsen*



*Mangt bendir á, at Moskusdunnan er eitt nýtiligt vápn ímóti pláguni, sum dreparasnigilin er. Hesar ganga hjá Andriasi Reinert í Havn*

*Mynd: J. Hammer*

Dreparasniglar hava seinnu árini verið ein plága í Føroyum. Serliga hjá teimum, ið fáast við urtagarðar og sum royna at fáa okkurt at vaksa kring húsini. Sniglarnir eru stórir og teir eta og drepa nærum allan vøkstur.

Ejolvur Djurhuus í Kirkjubø hevur nú gjørt eina roynd við Moskusdunnum, sum hann hevur fingið frá Andriasi Reinert í Havn. Hesar dunnur eta nærum alt, sigst.

- Eg havi fingið eitt par og slept teimum niðan, har gæsnar ganga, tí heilt har niðan hava sniglarnir otað seg. Hetta eru einir 14 dagar síðani og síðani havi eg ongan snigil sæð. Tó skal sigast, at eg havi ikki sæð dunnurnar eta sniglarnar, men teir eru so ikki at síggja longur, sigur Ejolvur.

Í Kirkjubø vóru tey komin í neyð av dreparasniglunum. Tey høvdu fingið sær røtur á eitt umleið 20 fermetra stórt stykki, men ikki ein rót kom upp. Sama var galdandi við øðrum vøkstri, men hvannir hava fingið frið fyri dreparasniglunum.

- Dreparasniglarnir gera helst eisini kál á hinum vanligu sniglunum, tí teir eru ikki at síggja longur, sigur Ejolvur Djurhuus.

- Tá heitt hevur verið í veðrinum og mjørki, havi eg onkutíð úr vindeyganum sæð hesar stóru sniglarnar á asfaltinum á vegnum. Men fuglar, sum t.d. Tjaldur og enntá Likka røra teir ikki og fara stóran umveg rundan um sniglarnar, sigur Ejolvur, sum hevur stórar vónir til Moskusdunnurnar, ið tykjast gera enda á dreparasniglunum.

## Úr Amerika

Andrias Reinert sigur seg bara hava hoyrt um hetta við Moskusdunnunum og dreparasniglunum, men ongar royndir hava við hesum. Men hann sigur, at dunnurnar nærum eta alt.

Moskusdunnan er ikki vanligt slag av dunnu, sum vit kenna dunnuna.

- Hetta er í grundini heilt annar fuglur. Hann livir upprunaliga í Suður-amerkia, har indiánar høvdu hann til húsdýr, tá hvíti maðurin kom, sigur Andrias Reinert.

Á donskum nevnist fuglurin Moskus And, á enskum Muscovy. Fraklendingar kalla hann Barbarie og har er hesin fuglur væl dámdur til matna. Í heimlandinum verður fuglurin róptur Patos.

# Vit fóru ikki út sum taparar

**Hetta sigur formaðurin í Føroya Handverkarafelag, sum hósdagin skrivaði undir nýggjan sáttmála við Handverksmeistararnar. Hóast lønarhækkanin ikki samsvaraði við settu málini, eru handverkararnir sum heild nøgdir**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Dagfinn Olsen*

Hósdagin skrivaðu Handverkarar og handverksmeistarar undir nýggjan tvey ára sáttmála, eftir tvey døgn í samráðingarhølunum.

Semjan sigur m.a., at sveinalønin 1. oktober 2001 hækkar við 6,80 krónum um tíman til 101,40 um tíman. Tann 1. oktober 2002 hækkar sveinalønin aftur við 6,80 til 108,20 um tíman.

## Ikki løn sum ætlað

Frammi hevur verið, at handverkarar høvdu sett nøsina upp móti eini løn uppá 115 krónur um tíman og at hetta krav var samtykt á fundi í Føroya Handverkarafelag. Um hetta ikki bleiv, so kom verkfall upp á tal.

Men hesum afturvísir formaðurin í felagnum, Poul Øregaard.

- Hattar passar ikki heilt, tí vit hava einki lovað, men vit hava líkasum loddað dýpið millum limirnar. Men satt er, at ynskiligt var við eini 115 krónum um tíman og at vit ikki mettu hetta ynski veruleikafjart, sigur Poul Øregaard.

Poul Øregaard vil ikki rættiliga brúka orðingina, at handverkarar hava slakað í krøvum sínum mótvegis handverksmeistarunum.

## Góð hækking í prosentum

Hann sigur um samráðingarnar, at trupult var at koma longur, tí mótparturin, meistararnir, læstu seg fastar. Hann leggur afturat, at tað ger ikki støðuna lættari, at formaðurin í Handverksmeistarafelagnum eisini er formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

- Men munurin millum okkum og Føroya Arbeiðarafelag er størri nú, enn hann var, sigur Poul Øregaard.

Hann sigur annars um samráðingarnar, at tær vóru sera truplar og at teir vóru uppsettir uppá verkfall. Men hetta fór neyvan at loysa seg, tí prosentvís var lønarhækkingin góð. Poul Øregaard vísir eisini á, at flestu arbeiðsgevarar gjalda meira, enn ásettu lønina, so í veruleikanum verður samráðst um eina minstuløn.

- Vit fóru ikki út sum nakrir taparar, sigur Poul Øregaard.

## Semjan

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum verður greitt frá semjuni og meistararnir siga har m.a., at teir valdu at taka við semjuni, hóast hon er høg, vísandi til lønarhækkingarnar í samfelagnum annars í ár.

Semjan sær soleiðis út:

Sáttmálarnir millum Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna, sum fóru úr gildi 1. oktober 2001, verða longdir við 2 árum til 1. oktober 2003 við niðanfyri standandi broytingum:

Lønarhækkan (grein 5)
Tann 1. oktober 2001 hækkar sveinalønin við 6,80 kr. um tíman til 101,40 kr. um tíman. Tann 1. oktober 2002 hækkar sveinalønin aftur við 6,80 kr. um tíman til 108,20 kr. um tíman.

Bakarar yvirtíð (grein 6, stk. 8)
Grein 6, stk. 8 verður broytt soleiðis: “Fyri at arbeiða frá kl. 4.00 til kl. 7.00 fáa bakarar 65 kr. eyka um tíman vanligar yrkadagar og 100 kr. eyka leygardag og halgidag. Bakarar fáa frí arbeiðsklæðir”.

Limagjald (grein 15)
Verandi orðing í grein 15 verður strikað og henda orðing sett í staðin:

“Stk. 1 Á hvørjum arbeiðsplássi kann verða avtalað, hvørt meistari skal eftirhalda limagjald hjá limum hjá handverkarafeløgum.

Stk. 2. Vanligur meirluti av handverkarum, serarbeiðarum og meistara á arbeiðsplássinum skal vera fyri hesum og atkvøðast skal við seðlum.

Stk. 3. Verður avtalað, at meistari skal eftirhalda limagjald, verður hetta at rinda til avvarandi handverkarafelag eftir nærri avtalu.”

Akkord (grein 25)
Grein 25, stk. 1 broytast soleiðis: Har arbeiði og umstøðurnar eru til tess, at akkord er gjørlig, skulu meistarar og sveinar fáa akkord í lag… (restin óbroytt).

Partarnir eru samdir um at gera standardavtaluseðlar og møguliga ein prískurant.

Grein 36 verður broytt soleiðis:
Stk. 1 Verður ósemja um arbeiði, sum ikki er tilskilað í sáttmálanum, skulu feløgini samráðast um arbeiðs- og lønarviðurskifti hesum viðvíkjandi, áðrenn farið verður til nevndarviðgerð.
Stk. 2 Allar trætur um rættu fatan av sáttmálanum verða avgjørdar av eini nevnd.
Stk. 3 Hvørt felag sær velur 2 limir til nevndin. Kemur nevndin ikki ásamt, verður dómarin ella annar av honum nevndur persónur uppmaður. Hansara avgerð verður at taka til fulnar.
Fastlønarsáttmálin: § 10, stk. 2, 3 og 4 verða strikað.

*Tórshavn tann 18. oktober 2001*

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
**Føroya Handverksmeistarafelag**

**Landsfelag Handverkaranna**
**Føroya Handverkarafelag**


